

## Ræðist ikki Beijing

Kinesiska mannarættindastríðskvinnan Rebiya Kadeer vil vera við, at leiðslan í Beijing brúkar landsins búskaparligu framgongd og megi til at fáa umheimin at gevast við at finnast at mannarættindunum í Kina. Rebiya Kadeer helt røðu á einum fundi, sum tað avstralska fjølmiðlafelagið skipaði fyri í Canberra í gjár, hóast kinesiskir umboðsmenn hava mótmælt, at hon var biðin til røðara á fundinum. Í røðuni takkaði hon avstralsku myndugleikunum fyri, at teir góvu henni innferðarloysi hóast mótmæli úr Beijing.



*- Sambært útlitunum, sum fiskifrøðingar nú hava lagt fyri dagin, sær ikki so galið út á landgrunninum. Tí kunnu vit bert vóna, at hetta fer at eggja íleggjarum til at taka neyðug stig, sum kunnu føra til, at virksemið aftur verður á Kósini, sigur formaðurin í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Arthur Guðjónsson*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# abrúnni nú virkið er stongt

møguligt virksemi á Kósini at gera.

- Nei, hetta er nakað, sum hevur ligið á láni, og sum SEV hevur vent sær til okkum við, segði hann.

Maðurin, vit hittu, segði seg eisini hava hoyrt søgur um, at Føroya Banki skal hava bjóðað Hanusi Hansen at keypa Kósavirkið, men hann dugdi einki at siga um haldbari í hesum søgum.

- Tað ljóðar, at bankin hevur boðið teimum virki, um peningurin verður rindaður kontant. Men samstundis hevur bankin sagt seg ikki vilja veita rakstrarfígging.

Kósavirkið er eitt rættiliga stórt fiskavirki, sum hevur verið rikið við nógvum ymiskum fiskasløgum og framleiðslum.

Jóhan Páll Joensen, sum seinastu árini hevur verið stjóri á virkinum, sigur, at virkið møguliga kundi lagt seg eftir færri fiskasløgum og framleiðslum.

- Tað veldst um so nógv, hvat loysir seg og ikki. Viðhvørt kann tað loysa seg at hava eitt breitt grundarlag, og viðhvørt kann tað vera ein vansi at keypa so nógv ymisk fiskasløg.

Í aðrari grein á hesi opnu sigur hann, at útlitini til fiskaframleiðslu ikki eru so galin í løtuni, men hann sigur seg samstundis ikki duga at síggja, at virksemið á Kósini byrjar aftur so skjótt, sum fólk helst vildu, nú nógv, sum áður høvdu sítt starv á virkinum, framvegis ganga uttan lønandi arbeiði.

# Eg veit einki um, at nakað er í umbúna

**- Tað einasta, eg veit, er, at P/F Kósin nú ætlandi skal lýsast til sølu, sigur fyrrverandi eigarin av fiskavirkinum Kósini í Klaksvík, Jóhan Páll Joensen**

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jóhan Páll Joensen, sum var stjóri á Kósini og sum framvegis situr í nevnd felagsins, sigur seg ikki duga at síggja, at virksemið á Kósini kemur í gongd aftur til heystar.

- Fólk eru í summarfrí, og eg hoyri einki frá nøkrum. Eg veit tí einki um sannleiksvirði í teimum søgum sum kunnu ganga um, at virksemið kanska byrjar aftur, áðrenn langt um líður.

Jóhan Páll vísir á, at Christian Andreassen er formaður í nevndini fyri P/F Kósina og tað einasta, sum fyrrverandi stjórin og eigarin í felagnum hevur skilt, er, at virkið í næstum verður lýst til sølu.

### Fyrimunur

Vit spurdu Jóhan Páll, um tað er ein fyrimunur hjá teimum, sum møguliga skulu reisa virksemið á Kósini aftur á føtur, at felagið ikki verður avtikið, men heldur fram og verður selt, sum tað er.

- Ja, tað er ein fyrimunur, um felagið heldur fram, tí virkið hevur longu tær góðkenningar, sum eru neyðugar. Tað kann verða strævnari at skula hava heilsufrøðiligu góðkenningarnar av nýggjum, sigur hann.

Sum nevndarlimur í P/F Kósini, nú nevndin er skipað av nýggjum, sigur hann seg einki vita um, at nakrar samráðingar í løtuni eru við møguligar keyparar.

### Ikki ringast

Spurdur, hvussu útlitini eru við lønandi fiskaframleiðslu í løtuni, heldur Jóhan Páll, at tey eru ikki ringast.

- Tað var heldur ikki virkið sum gjørdi, at vit komu soleiðis fyri, men heldur skipini.

Hann heldur, at tey virkir, sum í dag hava fisk at arbeiða við, eisini hava møguleikar at tjena pening, soleiðis sum gongdin og útlitini eru.

### Bara søgur

Í Klaksvík ganga søgur um, at Føroya Banki hevur bjóðað JFK við Hanusi Hansen P/F Kósina fyri einar 17-18 miljónir krónur, men hevur sagt, at bankin ikki vil veita rakstrarfígging.

- Nei, hetta veit eg einki um, men eg kann hugsa mær, at ein stórur trupulleiki hjá teimum, sum skulu reisa virksemið aftur, verður rakstrarfígging, sigur Jóhan Páll Joensen.

Samlaða veðskuldin í P/F Kósini er einar 32 miljónir krónur, og tað er Føroya Banki, sum hevur ræðisrættindini yvir felagnum.



*- Eg trúgvi, at tey virkir, sum hava fisk at arbeiða við í dag, eisini tjena pening, sigur Jóhan Páll Joensen, sum framvegis er í nevndini aftanfyri P/F Kósina*